# MENTAMÁLARÁÐIÐ

## Tíðaravmarkað størv sum einalærari í Húsar-Syðradals skúla og Fámjins skúla

Størvini sum einalærari í Húsar-Syðradals skúla og Fámjins skúla verður lýst leys til setanar í tíðarskeiðnum 1. august 2011 – 31. juli 2012.

**Um størvini**
Einalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur meginpartin av undirvísingini í skúlanum. Størvini eru fulltíðarstørv og tíðaravmarkað skúlaárið 2011/12.

Søkt verður eftir einalærara, sum
- skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgdina av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- skal virka fyri í samstarvi við foreldrini, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar

Førleikakrøv
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.
Um eingin lærari søkir starvið, verður umsøkjari, ið ikki hevur fólkaskúlalæraraútbúgving, settur í starvið.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.
Størvini er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mikudagin 1. juni 2011.

**Umsóknin verður stílað til:**
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 306500.

## LÆRARASTØRV OG VARASKÚLA-STJÓRASTARV Í FÓLKASKÚLANUM

Í fólkaskúlanum eru bæði føst og tíðaravmarkað størv leys at søkja til setanar 1. august 2011.

Føst størv eru í hesum skúlum:

| | |
|---|---|
| Eysturskúlin, www.eysturskulin.fo | 5 lærarastørv |
| Fuglafjarðar skúli, www.ffs.fo | 1 lærarastarv |
| Hvalbiar skúli, | 1 lærarastarv |
| Miðvágs-Sandavágs skúli, www.skulin.fo/mms | 4 lærarastørv |
| Sankta Frans skúli, www.sankta.fo | Varaskúlastjórastarv og 1 lærarastarv |
| Skála skúli, www.skulin.fo/ska | 1 lærarastarv |
| Skúlin á Fossánesi, www.skulin.fo/fos | 1 lærarastarv |
| Skúlin við Løgmannabreyt, www.svl.fo | 5 lærarastørv |
| Skúlin við Ósánna, www.skulin.fo/osa | 2 lærarastørv |
| Sumbiar skúli, | 1 lærarastarv 1333 árstímar |
| Sørvágs skúli, www.skulin.fo/sor | 1 lærarastarv |
| Vestmanna skúli, www.skulin.fo/ves | 2 lærarastørv |
| Viðareiðis skúli, www.skulin.fo/vid | 1 lærarastarv |

Har einki annað er viðmerkt, eru føstu størvini fulltíðarstørv. Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið og verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so er, at tann, sum sett/settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Lýsingar til størvini eru á heimasíðuni hjá einstøku skúlunum. Tað er skúlaleiðarin, sum setur størvini, og skulu umsóknir til størvini verða sendar beinleiðis til skúlan.

Tíðaravmarkað lærara- og varaskúlastjórastørv skúlaárið 2011-2012
Í nógvum skúlum eru eisini tíðaravmarkað størv leys at søkja, og verða hesi størv somuleiðis lýst á heimasíðuni hjá einstøku skúlunum. Tað er einstaki skúlin, sum skipar tíðaravmarkaðu størvini og verður umsókn um tíðaravmarkað starv send skúlanum.

Ynskja tygum nærri kunning, eru tygum vælkomin at seta tygum í samband við Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara á tlf. 555044 ella í teldubrævi, jenny@mmr.fo.

## Starv sum einalærari í Kunoyar skúla

Starvið sum einalærari í Kunoyar skúla verður lýst leyst til setanar 1. august 2011.

**Um starvið**
Einalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur meginpartin av undirvísingini í skúlanum. Starvið er fulltíðarstarv.

**Søkt verður eftir einalærara, sum**
- skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgdina av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- skal virka fyri í samstarvi við foreldrini, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.
Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mikudagin 1. juni 2011.

**Umsóknin verður stílað til:**
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu seta seg í samband við Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044 ella í teldubrævi til jenny@mmr.fo.

## Tíðaravmarkað størv sum útoyggjalærari í Mykines skúla og Kirkju/Hattarvíkar skúla

Størvini sum útoyggjalærari í Mykines skúla og Kirkju/Hattarvíkar skúla verða lýst leys til setanar í tíðarskeiðnum 1. august 2011 – 31. juli 2012.

**Um størvini**
Útoyggjalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur alla undirvísingina í skúlanum. Størvini eru fulltíðarstørv og tíðaravmarkað skúlaárið 2011/12.

**Søkt verður eftir útoyggjalærara, sum**
- skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgdina av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- skal virka fyri í samstarvi við foreldrini, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- skal hava regluligt samstarv við ein størri skúla

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.
Um eingin lærari søkir starvið, verður umsøkjari, ið ikki hevur fólkaskúlalæraraútbúgving, settur í starvið.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.
Størvini eru flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mikudagin 1. juni 2011.

**Umsóknin verður stílað til:**
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um størvini, kunnu seta seg í samband við Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044 ella í teldubrævi til jenny@mmr.fo